

**John P. Danielsen**
*fíggjarstjóri, Elfelagið SEV*

## Kjak

# Hækkingin av el-prísi hjá Tórshavnar kommunu

Neyðugt við neyvari avstemman millum SEV og Tórshavnar kommunu av árligu elnýtslu-uppgerðini hjá kommununi.

Ivaspurningurin um, hvat ein el-príshækking uppá 15 oyru/kWh fer at kosta Tórshavnar kommunu um árið, eigur at verða kannaður nærri til tess at fáa rætta kunnleikan fram.

Tórshavnar kommuna hevur meira enn 300 innleggingar ymsastaðni í allari kommununi.

Fyribils hagtøl frá debitorbókhaldinum hjá SEV vístu, at elpríshækkanin fór at kosta kommununi einar 800 tús. kr.

Ein eftirkanning vísti, at fleiri innleggingar ikki vóru komnar við í hagtølini í fyrsta umfari. Talan var um tær innleggingar, har mátingin varð umløgd til fjaravlestur í árinum og nakrar innleggingar, sum vórðu uppgjørdar út frá mettari nýtslu, orsakað av manglandi avlestri frá kommununi.

Tørvur er á at fáa eina neyvari avstemman av tølunum hjá okkum og hjá Tórshavnar kommunu. Herundir nærri avtala um mannagongd um, hvør tekur sær av at avlesa teir málarar, har kommunan sum vanligt er, hevur fingið sendandi avlesingarkort, men har SEV hevur mett um nýtsluna orsakað av, at avlestrar ikki eru móttiknir.

Eisini má hædd takast fyri innleggingum, sum kommunan eigur, men sum onnur gjalda.

Spurningurin er eisini, um kommunan hevur talt við ein stóran brúkara (uml. hálva mió. kWh í fjør), sum fær elmegi sum undirmátari undir eini av høvuðsveitingini hjá kommununi.

Meðan kommunan hevur upplýst talið 1,7 mió. kr. sum meirútreiðslu av elpríshækkingini, so vísa hagtølini úr bókhaldsskipan okkara, at rætta talið helst er uml. 1,4 mió. kr., men vísandi til frammanfyristandandi eru ávísar óvissur í uppgerðini av, nágreiniliga hvussu nógvar kWh kommunan brúkar um árið.

Ein neyv staðfesting av hesum fæst best við avstemming millum kommununa og SEV, herundir, hvat kommunan veruliga sjálv skal rinda fyri, og avlesing av teimum mettu elnýtslutølunum.

---

almannastovan

www.almannastovan.fo



## Kunning um almannaveitingar 2011

**Broytingar í upphæddum við gildi frá 1. januar 2011. Fyri 2011 eru veitingarupphæddirnar hesar(1):**

### Almannapensjónir o.a.

| | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|
| Grundupphædd til fólkapensjón – støk | 50.028,00 | 4.169 |
| Grundupphædd til fólkapensjón – gift hvør | 39.756,00 | 3.313 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – støk | 70.548,00 | 5.879 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – gift hvør | 56.064,00 | 4.672 |
| Viðbót til fólkapensjón – støk | 38.268,00 | 3.189 |
| Viðbót til fólkapensjón – gift hvør | 29.616,00 | 2.468 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 70.128,00 | 5.844 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 63.312,00 | 5.276 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 22.764,00 | 1.897 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – gift hvør | 19.776,00 | 1.648 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk | 21.492,00 | 1.791 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 17.256,00 | 1.438 |
| Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjónistar | 33.228,00 | 2.769 |
| Hjálparviðbót | 35.196,00 | 2.933 |
| Røktarviðbót | 70.248,00 | 5.854 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 32.916,00 | 2.743 |
| Frádráttarfrí inntøkupphædd – fólkapensjónistar | 60.400,00 | |
| Frádráttarfrí inntøkupphædd – fyritíðarpensjónistar | 90.600,00 | |

### Uppihald á stovni o.l.

| | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|
| Upphædd til persónligan tørv til persónar 60 ár og eldri | 11.892,00 | 991 |
| Upphædd til persónligan tørv til persónar undir 60 ár | 14.256,00 | 1.188 |
| Gjald fyri umlætting | 130,16 kr. | (um samdøgrið) |

### Viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. (brennistudningur)

| | Kr. árliga | Kr. pr. útgjald |
|---|---|---|
| Upphædd (3 útgjøld um árið) | 7.416,00 | 2.472 |

### Barnagjald og barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar

| | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|
| Barnagjald smb. § 5 | 12.672,00 | 1.056 |
| Barnagjald smb. § 15, stk. 1 og 2 | 12.672,00 | 1.056 |
| Økt barnagjald smb. § 15, stk. 3 | 25.344,00 | 2.112 |
| Barnaískoyti smb. § 19a | 6.420,00 | 1.605 um ársfj. |
| Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánað aftaná føðing eftir § 6, stk. 1 | 1.252,76 kr. | um mán. |
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6, stk. 1 | 732,13 kr. | (eingangsupphædd) |

### Gjald fyri uppihald á eldrasambýli

| | | |
|---|---|---|
| Gjald fyri umlætting | 130,16 kr. | (um samdøgrið) |
| Gjald fyri uppihald á eldrasambýli støk | 3.594,00 kr. | (um mán.) |
| Gjald fyri uppihald á eldrasambýli hjún | 2.433,00 kr. | (um mán.) |

### Egingjald fyri serlig bútilboð fyri heimleys

| | | |
|---|---|---|
| Serlig bútilboð fyri heimleys, § 11, stk. 2 | 1.794,00 kr. | (um mán.) |
| Eyka fyri kost í mesta lagi | 1.195,00 kr. | (um mán.) |
| Serlig bútilboð fyri heimleys, § 11, stk. 3 | 2.143,00 kr. | (um mán.) |
| Eyka fyri kost í mesta lagi | 1.195,00 kr. | (um mán.) |

(1) Sbr. kunngerð nr. 113 frá 13. desember 2010 um áseting om javning av almannaveitingum

**Økisdeildin í Tórshavn**
Smyrilsvegur 20
100 Tórshavn
tlf. 35 35 10 – fax 35 35 71

**Økisdeildin í Norðoyggjum**
Klaksvíksvegur 78A
700 Klaksvík
tlf. 45 72 40 – fax 45 72 41

**Økisdeildin í Eysturoy**
Heiðavegur
620 Runavík
tlf. 47 47 10 – fax 47 47 11

**Økisdeildin í Suðuroy**
800 Tvøroyri
tlf. 35 35 60 – fax 35 35 61